


# Matur, klipp og telefonir á sama staði



– Vit hava stórt úrval fyri lágan prís, sigur Sámal Hanni Lognberg

Mynd: Snorri Brend

**Týsdagin fáa skopuningar og sandoyingar eitt nýtt høvið at fara til handils í nýggju handilshøllini í Skopun.**
**– Nýggi matvøruhandilin kemur at eita "Sparni", tí her hava fólk møguleika at spara pening, sigur Sámal Hanni Lognberg, eigari**

HANDIL
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Skopun:** Á fyrsta sinni fáa nú skopuningar høvið at fara til handils í eini lokalari handilshøll.

Hetta hendir, tá nýggja høllin norðarlaga í bygdini letur dyrnar upp.

– Vit hava arbeitt í døgndrift hesa seinastu tíðina, sigur Sámal Hanni, tá vit hittu hann hósdagin. – Men týsdagin verður alt klárt!

Umframt ein stóran matvøruhandil fáa kundarnir eisini høvi til at keypa telefonir, eins og tey kunnu gera sær hárið undir sama taki.

Í dag er støðan hon, at nógv konufólk úr allari oynni arbeiða fisk í Skopun. Tí verður væntað, at fleiri teirra fara at gera innkeyp síni í nýggja handlinum, áðrenn tær fara aftur til húsa.

Íalt er nýggja handilshøllin 450 fermetrar stór. Uttanfyri eru góðar umstøður at seta bilin frá sær.

### Fyri alla oynna

Nú handilin umsíðir letur upp hevur Sámal Hanni góðar vónir fyri framtíðina.

– Ja, høvdu vit ikki hesar vónir, fóru vit als ikki undir hesa ætlanina, slær hann fast fyri Sosialinum.

Tað serstaka er, at kundin her kann fara til handils sum vanligt, men hevur samstundis møguleika at vitja inn í eina telebúð hjá Føroya Tele og fáa avgreitt síni ørindi har.

Hevur onkur hug at fara til frisør, so letur eisini upp ein salong í handilshøllini. Henda salongin ber heitið Salong 1700.

Tað er tó kortini matvøruhandilin sum eigur mesta plássið í høllini. Her fáa kundarnir allar vanligar matvørur, umframt gávulutir og apoteksvørur. Eisini er hugnaligur kaffikrókur á staðnum.

– Okkara handil skal vera fyri alla oynna. Vit ætla at leggja dent á at hava eitt stórt úrval av vørum, men fyri ein lágan prís.

– Vit skulu jú liva upp til navnið á okkara handili, sigur Sámal Hanni brosandi.

Nú handilin letur upp á fyrsta sinni, er ætlanin at veita kundunum nøkur góð tilboð.

# Sparkivøllur til børnini



*Gjørt er klárt til nýggjan sparkivøll í Dali*

**Børnini í Dali fáa nú lut í somu tænastu, sum onnur børn kring landið**

BÓLTSPÆL
*Orð/mynd: Snorri Brend*

**Dalur:** Alt er gjørt klárt til tann nýggja, graslagda vøllin niðri við sandin í Dali.

Økið er merkt av og gjørt tilbúgvið. Eftir er so bert at fáa grasvøllin lagdan á, soleiðis at tey bólthugaðu børnini í bygdini kunnu tala síni fyrstu skot.

Aftanfyri vøllin liggur bygdarhúsið "Eiriksgarður", her mong ymisk tiltøk hava verið gjøgnum árini.

Í løtuni verður bygdarhúsið útbygt rættiliga nógv, soleiðis at møguleiki verður at hýsa enn fleiri og størri tiltøkum í framtíðini.

# Skúvoyingar bjóða til stevnu

**Hesi seinnu árini hevur verið vanligt, at tey sum hava áhuga fyri støðuni á útoyggjunum og annars bygdamenning, hava hitst eina ferð um árið til eina serstaka útoyggjastevnu**

STEVNA
*Snorri Brend*

**Útoyggj:** Hesar stevnur hava eydnast sera væl, og rættiliga nógv fólk hevur leitað sær til hesar stevnur, hóast – ella kanska júst tí at! – tær hava verið á útoyggj.

Aftur í ár er ætlanin at hava eina slíka stevnu. Hon verður hildin í Skúgvi leygardagin 15. juli.

Í hesum sambandi ætla fyrireikararnir at geva út ein bókling í A5-stødd, har ein í fyrsta lagi fer at prenta skránna fyri stevnuna. Hinvegin er ætlanin somuleiðis at hava annað tilfar um vertsoynna við í bóklinginum. Ætlanin er at bóklingurin skal prentast í eini 500 eintøkum.

